Nýggjársrøða løgmans 1998/99

Bæði gjøgnum sjónvarp og útvarp sendi løgmaður Anfinn Kallsberg eina nýggjársheilsan gamlaárskvøld, har hann í stuttum greiddi frá tí buskaparligu gongdini í farna ár, og hvørjar ætlanir landsstýrið hevur fyri hetta komandi árið.
Niðanfyri endurgeva vit nýggjársrøðu løgmans:

Góðu landsmenn

Aftur stendur nýtt ár fyri durum, tað seinasta í hesi øldini. Ikki bert eitt ár verður lagt aftur um bak, men eitt túsund-araflokkin og Sjálvstýrisflokkin, og hevur samgongugrundlagið sum høvuðssetning fullveldi fyri Føroyar inn í næstu øld.

Hetta eru stór mál at seta sær sum land og fólk. Stórar avbjóðingar liggja í hesum setningi, og nógvar fyrireikingar skulu gerast, buskaparliga, stjórnarliga og politiskt.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fara undir samráðingar við donsku stjórnina næsta heyst um rikisrættarligu viðurskifti Føroya. Ætlanin er at gera ein sáttmála um skipað samstarv landanna millum.

At fyrireika hesa ætlan eru ein sáttmalanevnd, ein buskaparnevnd og ein fyrisitingarbólkur sett at gera djuptøknar kanningar um lítini eru fyri næsta ár.

Fyrst í juni mánaði varð avtala gjørd millum landsstýrið og donsku stjórnina um skuldar- og endurgjaldsspurningin um bankamálið.

Í høvuðsheitum asetir avtalan eitt endurgjald fyri bankamálið uppá 900 mio. kr. og eitt fast afturgjald av uttanlandsskuldini uppá 323 mio.kr. arliga í 20 ár við fastari rentu uppá 5%.

Stjórnarligt frælsi og buskaparligt frælsi eru tengd hvør at øðrum. Við hesi avtalu sum grundarlagi eru tvdningarmiklar buskaparligar fortreytir lagdar í eina fasta legu næstu árini, og staðið er lagt undir buskaparligari og politiskari nýhugsan.

Loksins sær ut til, at vit bruttoskuld uppá einar 8,5 mia.kr. til útheimin við eini tilsvarandi bruttoogn hjá peningastovnum, tryggingarfelagum, tí almenna og tí privata í útheiminum.

Landskassin hevur havt avlop seinastu tvey árini uppá tilsamans 550 mill. kr., og ætlaða avlopið í 1999 er 250 millionir. Av hesum skulu avdráttirnir til danska statin 120 mió. kr. gjaldast eins og neyðugt er at seta av til ovlentaðar útreiðslur at standa ímoti við.

Framgongdin í buskapinum seinastu árini fer møguliga at halda fram. Men tað er to ein avisur vandi fyri, at vit kunnu faa eitt minni fall í virksemnum næsta ár. Tað er tí neyðugt at styrkja buskapin og verða væl fyrireikað

Tann 15. mai varð nýtt landsstýri skipað millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin, og hevur samgonguskjalið sum høvuðssetning fullveldi fyri Føroyar inn í næstu øld.
Hetta eru stór mál at seta sær sum land og fólk.

skeið nærkast endanum.

Hesi túsund árini hava føroyingar buleikast í Føroyum, alt síðani víkingarnir leitaðu higar, settu bygd, skipaðu samfelagið og hildu ting á Tinganesi.

Setningur landsstýrisins

Eins og norrønu forfedrarnir busettust her sum frælst fólk er setningur landsstýrisins við túsundára lok at endurreisa samfelagið sum eina frælsa tjóð.

Eftir løgtingsvalið í vár gjørdist greitt, at fólkið valdi henda setning sum sín.

Tann 15. mai varð nýtt landsstýri skipað millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Hesi viðurskifti, sum verða støðið undir tí politisku viðgerðini og fólkaatkvøðuni í ár 2000.

Fyrst í nýggja árinum verður ein grundlógarnevnd sett at gera álit um eina føroyska grundlóg. Grundlógin verður somuleiðis løgd fyri Føroya fólk til fólkaatkvøðu.

Hetta skal verða ein skipað tilgongd, har Føroya fólk verður kunnað út í ærsir um hetta mál, samstundis sum tað verður Føroya fólk, ið tekur tá endaligu avgerðina um føroyskt fullveldi.

Búskapargongdin

Við árslok er vanligt at gera upp fyri farna árið, hvussu skarst og hvørji uteru við at koma uppundan aftur buskaparliga.

Vit hava fyri stuttum fingið tvær buskaparfrágreiðingar, eina føroyska og eina danska, og vísa báðar á góð buskaparlig úrslit.

Handilsjavnin gevur framvegis avlop, góðar 400 mio. kr. í ár. Útflutningsvirðið vaks meira enn innflutningsvirðið.

Gjaldsjavnin er beinleiðis avirkaður av hesum bata, og rentuútreiðslurnar minkaðu. Gjaldsjavnaavlopið verður væntandi omanfyri milliardina við árslok.

Nettouttanlandsskuldin verður væntandi knappliga null við árslok. Nettotalið kemst í høvuðsheitum av eini almennari og privatari

Nýggjársrøðan var mest ein afturlitandi røða, sum vísti á tað positiva sum er hent, og arvin frá undanfarna samgonguskeiði.

Har var lítið nýtt at hoyra, hon var varin, lítið sigandi, bar boð um ein rekan-við-streyminum politikk á flestu samfelagsøkjum.

Við undantak av fullveldissætlanini, sum skal haldast.

Føroya fólk hevði loyvi at vænta sær í hesum samhandi ein boðskap um eina liggarliga tilskering, eina byrjan uppá hetta ið hvussu so er.

Liggarlógararbeiðið í landsstýrinum, fyri komandi ár byrjar nú beinanvegin við árs byrjan, flestu fólk høvdu væntað eina tilskering til seinastu liggarlóg, tá tað varð boðað frá eini sokallaðari fullveldis liggarlóg.

Hon kom ikki, tað hendi just tað øvugta, liggarlógin hækkaði munandi, umframt hava landsstýrismenn hvør í sínum lag eisini boðað frá størri hækkingum komandi ár. Hetta hongur jú als ikki saman.

Niðurstøðan má ti verða.

At vantandi signalini í nýggjársrøðu løgmans benda á, at Føroyar nú aftur fara at føra eina rekan-við-streyminum politikk á flestu samfelagsøkjum.

Gott nyggjar.

Heilsan

Edmund Joensen

til búskaparlig bakkøst.

Vinna

Økta virksemið á sjógvi og landi sæst aftur í hagtølunum. Longdaldingarnar eru øktar 10% í ár nótvegis í fjør, sum svarar til støðið í 1990. Serliga er veksturin størst í fiskivinnuni, alivinnuni og byggivinnuni.

Just hesar vinnur hava fört við sær, at fleiri føroyingar sleppa aftur til arbeiðis og aðrir flyta heimaftur. Fólkatalið øktist 348 fólk, sum svarar til knapt 45.000 íbúgvar við árslok.

Arbeiðsloysið er komið niður á 7%, sum er ein stor lækking eftir fáum árum, men talið er enn ov stort.

Arbeiðsloysið er vorið at økja um útbúgvingarmøguleikarnar fyri m.a. at forða fyri varandi arbeiðsloysi.

Nýggju løgirnar um útbúgvingar innan tøkni, yrkisskular og yrkisútbúgvingar eru ein týðandi liður í at tilbúgva fólkið til arbeiðsmarknaðin til tess at fylgja tøknuligu samskiftismenningini.

Vinnuskularnir verða mentir til nýggjar avbjóðingar, sum m.a. verða neyðugar fyri at menna førleikan hjá føroysku arbeiðsmegini í oljuvinnuni.

Sum ein liður í fyrireikingini til eina oljuvinnu er ætlanin at leggja kolvetnisskattalogina fyri løgtingið til viðgerðar í januar mánaði, og uppskotið til fyrsta utbjóðingarumfarið verður lagt fram aftanað olavsøku.

Hoast oljuvinnan kann gerast eitt gott ikast til føroyska vinnulívið, verður fiskivinnan tó verandi okkara høvuðsvinna.

Fiskivinnan sum heild hevur aftur havt eitt gott ár og hevur hildið sær á sama høga støði sum undanfarin ár.

Veiðan undir Føroyum øktist 9% seinasta árið. Hysa, upsi og gullaksur eru økt munandi, men toskur, svartkalvi og kongafiskur eru harafturímoti minkað.

Rákstrarurslitið í veiðiliðinum gjørdist betri enn undanfarin ár. Veiðivirðið hækkaði meir enn økingin í veiðingdini, og avreiðingarvirðið øktist 30%, sum fyrst og fremst stendst av hægri fiskaprísum.

Fiskiflotin hevur verið førur fyri at gjalda hvørjum sitt, men ikki nóg mikið til at gera ilegur.

Eitt betri kappingarføri og broyttu reglurnar um at virka ein størri part av fiskinum í Føroyum hava fört við sær, at økti útflutningurin av virkaðum fiski og samsvarandi minkaði útflutningurin av óvirkaðum fiski saman við prísvøkstrinum á heimsmarknaðinum hava økt um útflutningsvirðið góð 10%.

Fyri fyrstu ferð í mong ár kann fiskiídnaðurin væntandi svara hvørjum sitt, men ikki nóg mikið til at endurnýggja vinnutólini.

Høgu fiskaprísirnir og lága rentustøðið í løtuni eru vinnufremjandi ávirkanir úr útheiminum, men tær eru óstøðugar og vit hava ónga ávirkan á, hvønn veg tær bera.

Vinnupolitikkur okkara eigur at vera langskygdur og bygga á varandi fortreytir fyri kappingarføri, sum er tengt at marknaðarkorunum hjá tí privata og bernevnunum hjá tí almenna, og tí hava talmanin av lønarvøkstrinum og almennum stuðulsskipanum alstóran týdning.

Ein sjálvberandi buskapur krevur lønsemi í vinnuni. Tað stóduga lønarlagið seinastu árini hevur borið í sær betri kappingarføri og fleiri arbeiðsplássx.

Vit eiga tí at visa varsemi og ikki økja um rákstrarútreiðslurnar, tí størri varsemi í beinleiðis útreiðslum gevur urtøku aðrastaðni í samfelagnum, sum tølini greitt vísa.

Innanlandsviðurskifti

Tær nógvu lønarutgjaldingarnar siggjast eisini aftur í inntøkunum hjá kommunum, sum í ár hava fingið væl meira av skattainntøkum, enn figgjarætlanirnar vístu.

Kommunurnar hava tí verið førar fyri at goldið eyka niður av skuldini í ár. Tó eru nakrar kommunur, sum hava so stóra skuld, at ein skuldarlætti er neyðugur.

Landsstýrið arbeiðir saman við kommunum við at finna eina loysn á hesum álvarsmáli og vónandi verður komið á mál fyrst í komandi ári. Eisini figgingin hjá kommunum eftir ár 2000 verður viðgerd og ásett.

Kommunualitið verður lagt til tingsins viðgerð í januar og út frá tí øroðaskiftinum verður kommunubygnaðurin í framtíðini stungin út í kortið við tí í hyggju at flyta uppgávur frá landi til kommunur, soleiðis at avgerð og figgarlig ábyrgd liggja so nær borgaranum sum gjørligt.

Hetta er ikki minst neyðugt, tá talan er um almannamál, har støða skal takast til persónlig viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

Pensjónsviðurskiftini hja teimum eldru eru ikki nøktandi. Tí hevur samgongan sett sær fyri at betra hesi viðurskifti við eini broyting í pensjónsskipanini sum heild.

Viðurskiftini við útheimin

Neyðugt er, at merkini við grannar okkara verða formliga skipað. Eitt av okkara tydningarmestu uttanlandsmálum er markið millum Føroya og Bretlands. Oformligar samrøður fara fram partanna millum, og mangt bendir á, at partarnir koma fram til eina semju í komandi ári.

Ein av grundarsteinunum undir tí føroysku vælferðini er samhandilin við útheimin.

Tað eydnaðist at gera grundleggjandi broytingar í sáttmálanum við ES, soleiðis at umleið 97% av okkara samhandli við ES hava ongar handilsligar forðingar.

Samstarvið við útheimin fer at økjast. Samstarvið við EFTA og ES verður tikið politiskt upp til máls næsta ár grundað á álitið um samráðingar við Europeiska Samveldið eins og handilssáttmalar verða gjørdir við aðrar partar av heiminum.

Altjóðageirðin fer at seta upp aftur størri krøv til Føroyar í komandi tíðum, tí verður neyðugt at Føroyar verða við í teimum avbjóðingum, ið bylgjast uti í heimi og gerast meiri virkin í heimssamfelagnum.

Sínámillum viðurskifti

Takkað verið flytførinum funnu føroyingar sær aðrar vinnumøguleikar, tá møguleikarnir heima vóru skerdir.

Øll tit, ið á ein ella annan hátt voru við til at bera byrðarnar gjøgnum tær tungu tíðirnar, soleiðis at vit kundu náa tey úrslit, vit hava lagt á borðið í kvøld, eiga eina stóra tøkk uppiborna.

Trupulleikum sleppa vit ikki undan, men at vinna á teimum, tað gevur stýrki og áræði at halda fram. Tann stýrkin, ið hevur borið føroyingum uppi í øldir, er stýrkin frá ti Almáttuga.

Føroya fólk kennir til vanlukkur á sjónum, og enn í dag henda slíkir sorgarleikir.

Í hesi løtu leitar hugur okkara í samkenslu til øll tey, sum hava verið fyri missi í farna ári, og hugur okkara leitar eisini inn á Strendur, har einkjur, systkin, foreldur og børn stríðast við stóra sorg eftir feigdarboðini í vár uni, at øll manningin á «Sjóborgini» varð farin undir Føroyum.

Hetta rakar tey avvarðandi meint, og er ein smeitur fyri bygdarfólkið og okkum øll sum fólk. Harrin styrki tykkum gjøgnum hesa sváru tíð.

Góðu landsmenn

Vit standa við eitt vegamót í søgu landsins. Týdningarmiklar avgerðir skulu takast, har hvør einstakur føroyingur eigur sín avgerandi lut.

Tað skal sterkur ryggur til at bera goðar dugar, sigur gamalt orðatak. Lat okkum halda fast um ta framgongd, vit við strevi hava vunnið okkum - eitt buskaparúrslit, sum ikki má gleppa okkum av hondum.

Stunda vit saman, tað veri seg persónliga ella samfelagsliga, megna vit at náa tey mál, vit hava sett okkum.

Árið 1998 royndist væl, og eg fari at bera Føroya fólki eina stora tøkk fyri virksfýsni farna árið. Eg ivist onga løtu í, at vit eisini í komandi tíðuni við ágrýti taka við teimum avbjóðingum, ið liggja fyri framman.

Vit stiga nú inn í seinasta árið aðrenn túsundáraskiftið, og hvør ger sínar tankar í sínum stilla sinni.

Vegna Føroya landsstýri fari at enda at ynskja øllum Føroya fólki á sjógvi og landi eitt av Harranum signað nýggjár 1999.

Anfinn Kallsberg,
løgmaður

Viðmerkingar

Viðmerking til nýggjársrøðu løgmans

Viðmerkingar

Veitst tú, at

– Barna- og Ungdomstelefonin svarar hvønn mánadag millum kl. 16-18.
– Telefonin er 10645
– Foreldur eisini kunnu ringja og faa ráðgeving.
– Tey, sum svara, hava tagnarskyldu.
– Tú kanst vera anonymur.

Hvat kanst tú ringja um

– Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia el. bulimi, alkohol, fyribyrging, royking ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.

Lýsingar til blaðið

Um síðstu freist at láta inn lýsingar sæst ovast á síðu 2

Dimmalætting

Vetrarstormur

Ódnarstormur um Føroya land,
hóni neyvan hvítan sand,
vetrarstormur fýsti
hart í gluggan rísti.

Brimar høgt við fles
og um Prestanes,
gláðar eftir fjørði
fram við hvítum svørði.

Myrkt og grátt um skarðið,
sæst als eingin varði,
gráar húsatekjur,
minningstrá upp vekir.

Ódnarstormar um Føroya land,
tá slitnaði brátt ættarband,
sigldu fedrar yvir høv,
í stormi funnu sína grøv.

Vekjast upp tey djupu sár,
tá ið tíðin var so svár,
vetrarstormur vekir minnið,
ið eg hevði goymt langt inni.

Dregur djúpt við ytstu fles,
skúmandi við Skarvanes,
nú ið stormur sviður sárið,
leingist mær at skoða várið.

Valdemar á Løgmansbø
9.11.98

Til skaldið Regin Dahl

Har tónar og orð
eru fjøll ella tari.

Her heiðrast skal tað skald
sum á fólkinum eigur vald
við tónum og orðum, ja
so væl vald
sum tað vakra einglalag
ið ljóðar handan hægri tjald,
fólki tilbað.

Tókk fyri gávu ríku kæri
vakur lýsir hann varði
um sjó tey høgu fjøll
yvir skarðið
til fólkaslóg her øll
har tónar og orð eru fjøll ella tari
samlar fólk í høll.

Tað er av mætum skøldum sum tær
mentunnarvarðin av sonnum ríkast.

'98 Baraldur á Berhellu